

Stjørnan-Neistin II 32-19(13-5)

# Stjørnan spákaði í hálvfinaluna

**Greipuvinnararnir úr Stjørnuni høvdu lættan dyst í fjórðingsfinaluni í Coca-Cola Cup kappinginum, tá ið tær leygardagin høvdu vitjan av næstbesta liðnum hjá Neistanum**

COCA-COLA CUP
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var ongantíð nakar ivi um, at verandi steypavinnararnir úr Stjørnuni fóru at spæla seg í hálvfinaluna, tá ið tær í fjórðingsfinaluni leiktu móti næstbesta liðnum hjá Neistanum. Og tað var serliga ein spælari, sum gjørdi av, at neistakvinnurnar skuldu vita, at tær einki høvdu at koma eftir. Unga Maria við Neyst gjørdi ikki mætari enn at skjóta fimm mál á rað teir fyrstu tíggju minuttirnar av dystinum, og tá ið Neistin ikki megnaði at svara aftur ein tí einastu ferð hesa løtuna, hevði heimaliðið lagt seg á odda 5-0, og so stóð skriftin á vegginum.

### Tóku sær av løttum

Stjørnan legði sum áðurnevnt beinan vegin sjógv millum seg og gestirnar úr Havn, og munurin bara øktist, so hvørt sum dysturin leið. Tað sást á øllum brøgdum at munurin á toppinum í bestu deildini og næstbestu deildini er stórur, og hóast neistakvinnurnar stríddust ófort, so var ikki nógv hjá teimum at gera.

Heimaliðið var snøgt sagt einar tveir klassar betri, og høvdu tær ikki tikið sær av løttum til tíðir, hevði hálvleiksleiðslan verið væl meiri enn 13-5.

Eftir steðgin kom eitt sindur meiri av ferð í dystin, og bæði liðini fingu meiri gongd á málskjótingina. Stjørnan var allatíðina greitt á odda, hóast Neistin fekk minkað um munin niður í seks mál, so gjørdi heimaliðið bara enn ein vørr og økti, og seinastu løtuna av dystinum gekk orkan undan hjá gestunum úr Havn, og so var tað lætt hjá Stjørnuni at økja munandi um sigurin.

Søljan-VÍF 16-13 (8-7)

# Søljan í hálvfinaluni

**Tað eydnaðist leygardagin Søljuni at spæla seg í hálvfinaluna í Coca-Cola kappingini við at vinna á VÍF á Giljanesi**

COCA-COLA KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í einum spennandi dysti á Giljanesi leygardagin eydnaðist tað Søljuni at basa vestmannakvinnum og harvið tryggja sær sess millum fýra tey seinastu liðini í Coca-Cola kappingini hjá kvinnum.

### Málfátækt

Dysturin var rættuliga javnur millum liðini bæði, og serliga í fyrra hálvleiki gekk javnt á, og liðini skiftust um at hava leiðsluna. Tað gekk rættuliga striltið hjá liðunum báðum at fáa mál, og besta prógvið um hetta er, at eitt skifti í fyrra hálvleiki var eitt tíðarbil upp á átta minuttir, har hvørki liðið fekk skorað.

Stutt áðrenn farið var til hálvleiks, legði VÍF seg á odda 7-6, men við bert tveimum minuttum eftir at leika í fyri steðgin, fekk Søljan skorað tvey mál, og tískil vóru tað tær, ið vóru á odda, tá ið steðgur var.

Í seinna hálvleiki fekk heimaliðið eisini betru byrjanina, og tær komu á odda 11-7, áðrenn tað aftur eydnaðist VÍF at koma á máltalvuna. Eftir hetta tóktist tað lítið sannlíkt, at gestirnir fóru at koma inn aftur í dystin, og so var eisini. Søljan helt seg allatíðina minst trý mál frammanfyri gestirnar, og tí eru tað tær, sum eru við í hattinum, tá ið lutur skal kastast um, hvussu leikast skal í hálvfinalunum í Coca-Cola kappingini hjá kvinnum.

# Tjaldur møtti ikki í Vági

**Fjórðingsfinalan í Vági millum VB og Tjaldur bleiv av ongum, tí at Tjaldur møtti ikki**

COCA-COLA KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Vágskvinnnur fingu onga dystarvenjing farna vikuskifti. Fjórðingsfinalan, ið tær skuldu leika á heimavølli móti Tjaldur, bleiv av ongum, tí at gestirnir møttu ikki.

Bogi Mortensen frá VB sigur, at Tjaldur boðaði frá undan dystinum, at tær ikki komu suður, so tað var ikki soleiðis, at VB-leikararnir stóðu íhøllini og bíðaðu eftir mótstøðuliðnum.

Hinvegin kenna tey seg í Vági ikki sum vinnarar, tí felagið hevur mist fitt av peningi, tí at dysturin ikki bleiv leiktur. Vanliga er fitt av fólki til heimadystirnar hjá VB, og Bogi Mortensen metir, at inntøkurmissurin hjá VB liggur um einar 5-6000 krónur, og tað er nógvir pengar hjá Vágs Bóltfelag, sigur hann.

# Neistin vann trygt

Fjórðingsfinalan millum Neistan og StÍF bleiv leikt longu farna mikukvøld. Her var ongantíð nakar ivi um, hvagar sigurin fór, og Neistin vann ein tryggan stórsigur 28-16 á StÍF.

Harvið eru neistakvinnur klárar til hálvfinaluna. Vit hava tíverri ikki fingið nakran dómaraseðil sendandi og hava tískil einki dystarhagtøl.

**tn**

# StÍF og Neistin í kvøld

Í kvøld verður ein dystur í Sunset kappingini leiktur á Skála. Har fær heimaliðið StÍF vitjan av Neistanum. Dysturin verður klokkan átta, og dómarar verða Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen.

**tn**

## Hondbóltsstøður

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | dystir | v - j - t | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 8 | 6 - 0 - 2 | 251 | 174 | 77 | 12 |
| 2 VB | 7 | 6 - 0 - 1 | 214 | 142 | 72 | 12 |
| 3 Stjørnan | 6 | 6 - 0 - 0 | 163 | 123 | 40 | 12 |
| 4 Søljan | 8 | 4 - 0 - 4 | 223 | 198 | 25 | 8 |
| 5 VÍF | 8 | 4 - 0 - 4 | 187 | 186 | 1 | 8 |
| 6 StÍF | 7 | 1 - 1 - 5 | 150 | 186 | -36 | 3 |
| 7 Kyndil | 7 | 1 - 1 - 5 | 131 | 192 | -61 | 3 |
| 8 Tjaldur | 7 | 0 - 0 - 7 | 135 | 253 | -118 | 0 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
MENN

| | dystir | v - j - t | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 9 | 7 - 0 - 2 | 281 | 220 | 61 | 14 |
| 2 VÍF | 9 | 5 - 0 - 2 | 265 | 229 | 36 | 14 |
| 3 H71 | 9 | 4 - 0 - 5 | 267 | 263 | 4 | 8 |
| 4 KÍF | 9 | 4 - 0 - 5 | 223 | 244 | -21 | 8 |
| 5 StÍF | 9 | 3 - 0 - 6 | 239 | 272 | -33 | 6 |
| 6 Neistin | 9 | 2 - 0 - 7 | 237 | 284 | -47 | 4 |